HEILSUMÁLARÁÐIÐ

# Ískoyti til sáttmála millum Kommunulæknafelag Føroya og Heilsumálaráðið – galdandi frá 1. oktober 2010

Eirargarður 2 • FO-100 Tórshavn

Tel: +298 304050 • Fax: +298 354045 • E-mail: hmr@hmr.fo

## *Ískoytis sáttmáli*

Heilsumálaráðið ynskir at javnseta kommunulæknar í føstum starvi og avloysarar soleiðis at avloysarar koma at rinda ein part av lønarútreiðslum til viðtalustarvsfólkini. Viðtalustarvsfólkini hjá avloysarum skulu verða sett í starv hjá Heilsumálaráðnum og tá ongin avloysari er, skulu viðtalustarvsfólkini eisini kunna arbeiða í øðrum kommunulæknaviðtalum.

## *Kommunulæknar í føstum starvi*

**§ 1.** Við sjúku ella barsil hjá einum lækna í føstum starvi skal Heilsumálaráðið tryggja lønina til viðtalustarvsfólkið. Hetta skal vera galdandi eftir somu reglum sum tá Administratiónsfondurin rindar kommunulæknanum fyri sjúku, tað vil siga, um fráveran varðar í meira enn fimm arbeiðsdagar.

*Stk. 2.* Við sjúku hjá viðtalustarvsfólki (um sjúkan varðar í meira enn fimm arbeiðsdagar) rindar Heilsumálaráðið fyri møguligan avloysara av viðtalustarvsfólki.

*Stk. 3.* Tá kommunulækni í føstum starvi fer á góðkent skeið, kann læknin søkja Heilsumálaráðið um endurgjald fyri lønarútreiðslur til viðtalustarvsfólk og verður hetta gingið á møti, um fíggjarjáttanin loyvir tí.

## *Broytingar av inntøkum og útreiðslum í samband við avloysarar fyri kommunulæknar.*

**§ 2.**

- **Inntøkur** hjá **avloysara** (allir avloysarar líkastillaðir)
  - veitingargjøld frá Heilsutrygd
  - veitingargjøld frá Heilsumálaráðnum (profylaksar)
  - veitingargjøld frá Skipaeftirlitinum (bláa bók) og Tryggingarfelagnum
  - tryggjað inntøku upphædd á kr. 20.000 netto um vikuna[1]

*Stk. 2.*

- **Útreiðslur** hjá Heilsumálaráðnum
  - partvísar lønarútreiðslur til viðtalustarvsfólk
  - útreiðslur til kommunulæknan, ið tryggjar minstu inntøku
  - endurgjald fyri ferðaútreiðslur
  - trygging
  - bilaleiga

*Stk. 3.*

- **Inntøkur** hjá Heilsumálaráðnum
  - basisgjaldið verður goldið frá Heilsutrygd til Heilsumálaráðið, - hetta skal nýtast til lønarútreiðslur til viðtalstarvsfólkið.

---

[1] Inntøkutrygdin er fyri eina arbeiðsviku, ið er á 40 tímar vanligt dagarbeiði og eini vakt.

## *Broytingin:*

**§ 3.** Hetta ískoyti í sáttmálanum kemur at hava við sær, at kommunulæknar í føstum starvi, peningaliga, verða meira javnsettir við kommunulæknaavloysarar. Fyri at tryggja at avloysararnir eisini koma at gjalda fyri viðtalustarvsfólk verður basisgjaldið ikki longur veitt kommunulæknaavloysarum. Henda upphædd verður flutt frá Heilsutrygd til Heilsumálaráðið, sum framyvir hevur lønarútreiðslur til viðtalustarvsfólk hjá kommunulæknaavloysarum. Hetta er treytað av góðkenning frá samstarvsnevndini í Heilsutrygd.

**§ 4.** Allir avloysarar verða løntir á sama hátt, tvs uttan mun til um avloysarin er í einum ósettum starvi ella í ein settum starvi.

## *Útreiðslur í sambandi við læknar undir útbúgving*

Útreiðslurnar hjá tutorlæknum, ið standast av at hava útbúgvingarlækna í Føroyum í mun til í Danmark, eru nærum ongar og inntøkurnar eru fleiri í Føroyum enn í Danmark, her serliga hugsað mánaðarliga viðbótin fyri at hava útbúgvingarlæknar. Mánaðarliga viðbótin, ið verður latin tutorlæknunum er ikki í danska sáttmálanum, ikki í sáttmála við kommunulæknar (MSF ella HMR) og heldur ikki er nøkur skrivlig avtala við Landssjúkrahúsið hesum viðvíkjandi. Tutorlæknin fær allar inntøkur av virkseminum hjá útbúgvingarlæknunum, tí verður mett rímuligt at gera broytingar í hesum viðurskiftum.

Mynd 1 vísir, hvussu danska skipanin er skipað tá tað snýr seg um at útbúgva læknar til serlæknar í almen medisin. Talvan vísir somuleiðis, hvør er setanarmyndugleiki og hvør rindar lønina. Í teigunum "setanarmynduleiki" og "løn" er sett upp, uppskot til eina føroyska skipan.

Mynd 1: Útbúgving, setanarmyndugleiki og lønarveitari

| **Útbúgvingargongd** | **Útbúgvingarpartur** | **Setanarmynduleiki** | | **Løn** | |
|---|---|---|---|---|---|
| | | **DK** | **FO** | **DK** | **FO** |
| Klinisk basisuddannelse | Sjúkrahúsdeildir og/ella almen praksis, 12 mðr. | Regiónin | LS | Regiónin | LS |
| Intro-starv | Intro-amanuensis, 6/12 mðr. | Regiónin | LS | Regiónin | LS |
| Høvuðsútbúgving | Praksisamanuensis, stig 1, 6 mðr. | Regiónin | LS | Regiónin | LS |
| Høvuðsútbúgving | Hospitalsafdelinger, 30 mðr. | Regiónin | LS | Regiónin | LS |
| Høvuðsútbúgving | Praksisamanuensis, stig 2, 6 mðr. | Tutor-læknin/ praksis | LS | Tutor-læknin | LS |
| Høvuðsútbúgving | Praksisamanuensis, stig 3, 12 mðr. | Tutor-læknin/ praksis | LS | Tutor-læknin | LS |

kelda: www.laeger.dk

## *Broytingar í tutorlækna viðbót frá 1. januar 2011:*

**§ 5.** Setanarviðurskiftini undir allari serlæknaútbúgvingini, verða framhaldandi á Landssjúkrahúsinum og Landssjúkrahúsið hevur allar lønarútreiðslurnar til útbúgvingarlæknan.

*Stk. 2.* Tutorlæknin fær eina mánaðarliga viðbót fyri, -basislæknar, -introlæknar og -útbúgvingarlæknar á stigi 1, uppá kr. 4.500.

*Stk. 3.* Á stigi 2 og 3 verður ongin mánaðarlig viðbót latin tutorlæknunum.

## *Seravtalur:*

**§ 6.** Møguleiki er fyri at gera seravtalur í einstøku læknaviðtalunum ella læknadømunum í samráð við og góðkenning av Kommunulæknafelag Føroya.

Tórshavn, tann 30. september 2010

| Kommunulæknafelag Føroya | Heilsumálaráðið |
| --- | --- |
| ____________________________ | ____________________________ |
| Jaspur Petersen, formaður | Aksel V. Johannesen, landsstýrismaður |
| | ____________________________ |
| | Poul Geert Hansen, aðalstjóri |